**Spurningar til útbjóðingartilfar viðv. Telefoni og Internet**

1. Skal tilboðið innlatast við eindarprísum? Um ikki mugu vit fáa nágreiniligt yvirlit yvir, hvussu nógv hald av hvørjum slag, talan er um?

    SVAR:
    Vit síggja fyri okkum, at tilboð verður latið inn við eindarprísum – tvs, prísurin eitt hald kostar í ein mánaða.

2. Pkt 2.1 vísir til, at tann einstaki stovnurin tekur støðu til hvønn rammusáttmála hann nýtir, tó undir ávísum treytum
    a. Hvørjar eru hesar treytir?

        SVAR:
        Her hevði verði rættast um tað stóð: "... tó undir ávísum treytum, sum eru lýstar nærri annað stað í hesum útbjóðingartilfar".

3. Pkt. 2.1 ásetur at viðskiftatreytirnar skulu verða nøktandi
    a. Hvørjar eru hesar viðskiftatreytir? Eru nøkur minstukrøv til viðskiftatreytirnar?

        SVAR:
        Tá vit vísa til, at viðskiftatreytir skulu verða nøktandi, so meinast hetta við tær treytir veitarin setur til síni viðskiftafólk.
        Tað eru ongi minstu krøv til viðskiftatreytirnar.
        Ásetingin í útbjóðingarskrivinum er heldur ein verja móti órímiligum og óvanligum viðskiftatreytum, samanborið við hvat veitarar á føroyska telemarknaðinum vanliga hava í sínum viðskiftatreytum.

4. Pkt. 2.4 ásetur at stovnar skulu søkja um at fáa undantak frá Gjaldstovuni, um teir ikki kunnu nýta rammusáttmálan. Meginreglan er, at stovnurin, sum fær undantak skipar sítt egna útboð. Í slíkum førum er tað krav, at viðkomandi stovnur hevur verið í samskifti við vinnandi veitaran av rammusáttmálanum
    a. Er einans ein vinnandi veitari av rammusáttmálanum?

        SVAR:

Gjaldstovan vónar at gera fleiri rammusáttmálar, men tað ber til, at einans verður gjørdur ein rammusáttmáli, eitt nú um ein veitari ikki líkur treytirnar í útbjóðingartilfarinum.
Ásetingin, sum víst verður til, er um støðan uppstendur, at bara ein rammusáttmáli verður gjørdur – tá kann verða neyðugt við undantøkum.

5. Pkt. 2.4 Rammusáttmálin umfatar ikki keyp av fartelefonum.
   a. Hví er keyp av fartelefonum ikki partur av rammusáttmálanum? Er ætlanin at skipa keypa av fartelefonum vm. í øðrum útboði?

      SVAR:
      Gjaldstovan hevur valt, at keyp av telefonum er partur av rammusáttmálanum – "KT útgerð". Tað er avmarkað hvussu nógvar telefonir landsins stovnar keypa, tí varð valt at leggja keyp av nýggjum telefonum í annað útboð. Rammusáttmálin til kt útgerð liggur í løtuni í útboð á Keypsportalinum.

6. Pkt. 3.9 Tað er eitt krav, at veitarin veitir telefoni í høgari góðsku og at stovnarnir eru nøgdir við góðsku og tænastu.
   a. Hvat er telefoni í høgari góðsku? Hvussu verður hetta ásett/máta?

      SVAR:
      Høg góðska á telefoni er, at tænasturnar virka sum tær eiga. Harumframt er góðska ein subjektiv meting, og subjektivar metingar verða ásettar við fráboðanum og royndum, sum stovnar landsins gera sær.
      Tí síggja vit fyri okkum, at um ein veitari hevur lága góðsku, so verður hetta staðfest við fráboðanum frá stovnum landsins um at tænasturnar ikki eru nøktandi.

   b. Hvat er góð góðska og tænasta? Hvussu verður hetta ásett/máta?

      SVAR:
      Góð góðska og tænasta frá einum televeitara er ein subjektiv meting, og subjektivar metingar verða ásettar við fráboðanum og royndum, sum stovnar landsins gera sær.

   c. Hvussu verður mett um stovnarnir eru nøgdir við góðsku og tænastu?

      SVAR:
      Góð góðska og tænasta frá einum televeitara er ein subjektiv meting, og

subjektivar metingar verða ásettar við fráboðanum og royndum sum stovnar landsins gera sær.

7. Pkt. 3.9 ásetur, at tað er eitt krav, at veitarin leggur orku í at hava eitt trygt net. Harumframt er tað eitt krav, at veitarin lýkur øll trygdarkrøv sett av myndugleikunum
    a. Hvussu verður mett um ein veitari leggur orku í at hava eitt trygd net?

       SVAR:
       Tað er eitt krav fyri at fáa ein rammusáttmála við landsins stovnar, at man leggur orku í at hava eitt trygt net. Hvussu Gjaldstovan fer at føra eftirlit við um hetta verður gjørt, ynskja vit ikki at upplýsa.

    b. Hvørji er trygdarkrøvini sum sipa verður til, sum øll trygdarkrøv?

       SVAR:
       Ásetingin vísir til, at veitarar skulu halda treytir, sum eru settar veitarum í Føroyum. Tað vil siga myndugleikakrøv, ið eru ásett við lóg ella líknandi. Gjaldstovan er ikki myndugleiki á fjarskiftisøkinum, og fer at vísa veitarunum víðari til myndugleikan á fjarskiftisøkinum, fyri at fáa greiðu á hvørji myndugleikakrøv verða sett til veitarar av fjarskifti í Føroyum – um veitarin ivast.

8. Pkt 5.2 vísir til at tilboð sum ikki lúka øll minstukrøv verða burturvíst
    a. Hvørji eru hesi minstukrøv? Ynskiligt hevði verið at fingið ein lista við minstukrøvum, soleiðis at eingin ivi var um hvørji minstukrøvini eru

       SVAR:
       Vit meta at okkara krøv eru væl lýst í okkara útbjóðingartilfar. Um vit skuldi gjørt ein lista, so er sannlíkt at hann hevði sæð nærum eins út sum sjálvt útbjóðingartilfarið. Harnæst er vandi fyri, at lesarin kann lesa útbjóðingartilfar og listan ymiskt, og tað støðu ynskja vit ikki. Vit ynskja tí ikki at gera ein minstakrav lista.

9. Pkt 5.3 vísir til at innkomnu tilboðini skulu lúka form- og minstukrøvini
    a. Hvørji eru form- og minstukrøvini í útboðnum?

       SVAR:
       Tey eru at finna í útbjóðingartilfarinum.

10. Er møguleiki at fáa deilt vinnubreiðbond og SAMnet betri deild upp? Tað er sera stórur munur á innkeypsprísi á ymsu ferðinum og hvat tøkni verur umbiði.

SVAR:
Vit hava onga slíka uppgerð, og hava ikki stundir til at framleiða hesa uppgerð, nú so fáir dagar eru eftir til tilboð skulu latast inn.

11. Er nakar kærumyndugleiki í sambandi við endaligu niðurstøðuna av útboðnum?

SVAR:
Gjaldstovan eigur avgerðina. Til ber at klaga hana til stjórnarráðið yvir Gjaldstovuni, sum er Fíggjarmálaráðið, vísandi til stk. 11.1 í rundskrivinum um keyp av vørum og tænastum.

12. Hvussu nógv data verður í miðal brúkt uppá roaming pr mðr?

SVAR:
Vit hava onga slíka uppgerð, og hava ikki stundir til at framleiða hesa uppgerð, nú so fáir dagar eru eftir til tilboð skulu latast inn.

13. Av tí at sáttmálin í útgangsstøði bert er eitt ár til longdar, so kann tað hugsast at fleiri av stovnunum framvegis ikki eru fluttir til vinnandi útbjóðara tá tíðarskeiðið er av. Metir Gjaldstovan, at hetta er nøktandi?

SVAR:
Vit eru skiljandi fyri teimum avbjóðingum ein eitt ára sáttmáli vil viðføra. Hinvegin er talan um ein øðrvísi útbjóðingarhátt, sum vit ikki hava roynt fyrr, og er tað orsøkin til, at Gjaldstovan ynskir ein 1 ára sáttmála við møguleika fyri leingjan upp til 3 ár.